**Magnus Heinason – Túrfrágreiðing**
**Standard hydrografi. Túrur nr. 1524**
**Tíðarskeið 10/6-17/6-2014**

---

**Fólk frá Havstovuni:** Karin Margretha H. Larsen og Regin Kristiansen.

**Ábyrgd:** Karin Margretha H. Larsen

**Endamál:** Endamálið við túrinum er at fylgja við broytingunum í havinum kring Føroyar og at leggja fortoyingar út. Túrurin er ein partur av teimum regluligu kanningunum eftir standardskurðunum, og er partur av NACLIM-verkætlanini.

**Reiðskapur:** Streymmátarar og útgerð at leggja út við. CTD-in og WP2-glúpur.

**Um túrin:** Vit fóru út hósdagin 11/6 kl. 2100. Siglt varð suður á Munkagrunnin, har tvær rammir NWSQ og NWSK blivu lagdar út og síðan tvær vanligar fortoyingar NWSM á umleið 720 metra dýpi og NWSC á 1085 metra dýpi í Hetlandsrennuni. Tá seinna boyan var farin út tóku vit eina CTD-støð við trimum hitamátarum (MicroCats) festum á CTDina – hetta fyri at kunna samanbera mátingarnar frá ymsu tólunum. Hetta var liðugt tíðliga seinnapartin fríggjadagin 12/6 og tá varð stimað vesturum, har boyurnar NWFC og NWFB blivu lagdar út í Bankarennuna. Síðan bleiv siglt norður á Skurð M, ið bleiv tikin inn móti Mykinesi og síðani varð hildið áfram við skurði R út á Ryggin. Hetta var liðugt leygarkvøldið 13/6.

Siglt varð nú norður á 63°30N á standardskurðinum norðanfyri, har ein boya (NWNH) bleiv løgd út. Hetta er fyrstu ferð, at ein streymmátari liggur á hesi knattstøðu. Vit tóku eisini eina CTD støð beint eftir at boyan var farin út. Síðan sigldu vit suður á knattstøðuna hjá boyu NWNB, har seinasti streymmátarin bleiv lagdur út á middegi sunnudagin 14/6. Vit sigldu síðani á Havnina, hagar vit komu kl 1845 sunnukvøldið 14/6.

Alt gekk væl og alt riggaði, sum tað skuldi á túrinum. Veðrið var gott allar dagarnar.

**Prøvataking:** Við Seabird CTD-ini tóku vit 16 støðir og saltprøvar á teimum flestu støðunum. Við WP2 glúpinum tóku vit 14 støðir. Prøvar til CO2, æti og tøðevni, blivu tiknir á einari støð á Rygginum.

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Saltprøvarnir verða analyseraðir í heyst og hinir prøvarnir í summar.

**Viðmerkingar:** Ongar

16-06-2015

Karin Margretha H. Larsen

HAVSTOVAN
FAROE MARINE RESEARCH INSTITUTE



Kósir og støðir á túri 1524